# ítróttur

Nr. 244 • týsdagur • 21. desember 2004 • 78. árgangur • www.sosialurin.fo

# Fróði og Ingi í B36

**B36 styrkti sær munandi um hópin til komandi kappingarár, tá ið felagið á samkomu í B36-húsinum sunnudagin skrivaði sáttmála við ávíkavist Fróða Benjaminsen og Inga Højsted**

FÓTBÓLTSFYRIREIKINGAR
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*




*Formaðurin í B36, Kristjan á Neystabø, heldur, at leikarahópurin hjá B36 komandi kappingarár er tann sterkasti í søgu felagsins, og at góður møguleiki eigur at verða fyri at vinna seg upp aftur á tindin í føroyskum fótbólti*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

Í hesum døgum arbeiða fótbóltsfeløgini kring landið av øllum alvi við at styrkja sær um hópin til komandi kappingarár. Tey flestu av feløgunum eru komin rættuliga væl áleiðis í hesum fyrireikingum, og á samkomu sunnudagin í felagshúsinum kunngjørdi B36, hvussu hópurin hjá teimum sær út komandi kappingarár.

### Miðvallargeneralurin funnin

Nógv B36-viðhaldsfólk høvdu lagt leiðina framvið felagshúsinum mitt í øllum jólameldrinum, og tey sótu spent og bíðaðu eftir, at formaður felagsins, Kristjan á Neystabø, fór at almannakunngera leikarahópin.

Áðrenn hópurin bleiv kunngjørdur, vóru tað tó tvær undirskriftir, ið restaðu í, og tær vóru tískil avgreiddar. Fyrstur fram til borðið hjá formanninum var Ingi Højsted, sum eftir at hava verið nøkur ár í Arsenal, nú er vendur aftur til Føroya og barndómsfelagið hjá sær. Ingi hevur í longri tíð vant við árstalsfelagnum, og tað hevur leingi ljóðað, at hann fór at gera sáttmála við felagið, og nú er hetta veruleiki.

Seinni leikarin, ið setti seg til formansborðið til tess at skriva undir sáttmála, var landsliðsleikarin Fróði Benjaminsen. Hetta er uttan iva ein sera kærkomin styrkur hjá B36, tí einamest í farna kappingarári var ein tann størsti veikleikin hjá B36, at teimum vantaði ein miðvallargeneral, ið kundi taka kommandoina á miðvøllinum. Hendan tykjast teir nú hava funnið í Fróða, og tað styrkir liðið munandi.

### Sterkasti hópurin nakrantíð

Formaðurin í B36, Kristian á Neystabø, var sera væl nøgdur, nú hópurin fyri komandi ár er komin upp á pláss. Hann segði á samkomuni, at tað er ikki óhugsandi, at fleiri spælarar koma afturat, men at tað neyvan verður meiri enn tann eini profilurin afturat.

Kristjan á Neystabø segði, at eftir hansara tykki er hópurin hjá árstalsfelagnum komandi kappingarár helst tann sterkasti nakrantíð. Hann segði, at við tilgongdini av omanfyri nevndu leikarum, umframt Jákupi Mikkelsen, Herbert í Lon Jacobsen og Mikkjal Thomassen, skuldi møguleikin fyri at koma upp aftur á ovasta føroyska fótbóltstindin verið heilt góður, og at føroyameistaraheitið eisini er málið fyri komandi ár.

# Spennandi avbjóðing

**Landsliðsleikarin Fróði Benjaminen , sum nú verður at síggja í hvítu B36-blusuni, er sannførdur um, at B36 hevur ein so mikið góðan hóp, at góður møguleiki er fyri at vinna føroyameistaraheitið**

LEIKARASKIFTI
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Tað hevur leingi verið nógvur slatur millum fótbóltsáhugaðar føroyingar um, hvar landsliðsleikarin Fróði Benjaminsen skuldi leika komandi kappingarár. Fleiri feløg hava verið sett í samband við Fróða, serliga eftir at tað gjørdist greitt, at hann neyvan fór at halda fram í Íslandi. Sunnudagin fekst so ein endi á hesum slatri, tí tá setti Fróði navn sítt undir eina avtalu við B36, sum eisini er tað felagið, ið ofast var nevnt í hesum slatri.

### Einki trýst

Fróði Benjaminsen sigur, at eftir hansara tykki hevur B36 eitt sera gott og spennandi lið komandi ár, sum avgjørt kann vinna FM-heitið. At Fróði er keyptur til at verða ein av berandi kreftunum á liðnum, og sum skal verða generalurin á miðvøllinum hjá havnarfelagnum, er neyvan nakað ivamál. Spurdur um hann kennir tað sum eitt stórt trýst á seg, tá ið formaðurin í B36 sigur, at við teimum leikarum, ið felagið hevur fingið, er málið einans føroyameistaraheitið, sigur Fróði: – Eg føli tað ikki sum nakað trýst, og tað er ikki nakað, sum eg fari at hugsa um. Málið er FM, og mín partur skal so ikki liggja eftir, sigur hann.

Fróði sigur, at hann hevði tilboð frá fleiri øðrum føroyskum feløgum, men at tilboðið frá B36 var tað mest áhugaverda. Einki tilboð var frá nøkrum íslendskum flag, hóast onkur fyrispurningur hevði verið. Sáttmálin millum Fróða Benjaminsen og B36 er galdandi í eitt ár.




*Landsliðsleikarin Fróði Benjaminsen verður komandi kappingarár at síggja í hvítu blusuni hjá B36, eftir at hann herfyri kom heim aftur úr Íslandi, har hann hevur roynt seg í Fram seinasta árið.*
*Mynd: Álvur Haraldsen*